# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fólkatalsgongdin og samferðsla

Vøksturin í fólkatalinum seinastu árini hevur gjørt allar dómadagsprofetiirnar frá fyrst í 90'unum til skammar, og kundi hetta verið ein góð áminning til okkum at gevast við at vera so svart hvít, sum vit mangan eru.

Hyggja vit eftir seinastu greiningini frá Hagstovuni um fólkatalið í Føroyum, so sæst, at gongdin heilt týðuliga er ein mennning í meginøkinum, meðan útjaðarin tykist hava trupult at halda uppá fólkið. Norðoyggjar og Vágarnar hava næstan rokkið sama støði, sum hesi øki høvdu í 1989 og hevur gongdin seinastu tíðina verið positiv. Verri er statt við Suðuroynni og Sandoynni, har fólkatalið er 6% undir tølunum fyri 1989. Serliga galið er í Suðuroynni, har fólkatalið í dag er sum í 1920'unum.

Hvørjar munnu orsøkirnar vera? At meginøkið veksur, er sama gongd, ið vit kenna frá grannalondum. At Vágarnar og Norðoyggjar eru væl við er óivað fasta sambandinum fyri at takka. Fasta sambandið, hóast ikki ókeypis, sum tað átti at verið, hevur gjørt, at ferðing til og frá ikki longur er ein forðing. Sandoyggin og Suðuroyggin eru í hesum sambandi nógv verri fyri og vísir hetta, hvussu nógv sambandið hevur at týða. Útjaðarapolitikkur kann í ein sera stóran mun kókast niður til samferðslupolitikk.

Vit kunnu í hesum sambandi spyrja, um stóra íløgan í ein nýggjan Smyril við stórt sæð sama avmarkaða frekvensi er pengarnar verd. Vit hava t. d. ikki sæð nærtil somu menning í Suðuroynni eftir at nýggi Smyril kom, sum t.d. í Sandavági eftir at undirsjóvartunnilin til Vágarnar kom. Her er einki sokallað "step change", men bert ein dagføring og nýmótansgerð av tí verandi.

Skal Suðuroynni vera lív lagað, má frekvensurin upp fyri at sleppa til og frá. Hetta fær man ikki við einum skipi av Tvøroyri til Havnar, sum siglur gott 20 míl. Einasti møguleiki fyri at hækka frekvensin munandi til Suðuroyar er at leggja sambandið yvir Sandoynna. Hetta hevði eisini hjálpt Sandoynni, tí fólkagrundarlagið í Suðuroy vildi lagt afturat til eina munabetri felags samferðsluloysn fyri báðar oyggjarnar.

Vit minnast, hvussu drúgt tað var at sleppa frá beinleiðis rutunum millum Vágarnar og Havnina, og Klaksvík og Havnina, men hvør ivast í dag í tí rætta at niðurleggja hesar rutur, til frama fyri at fara eftir landinum, har man kann? Er ikki tíð at gera eina framtíðartryggjaða felags loysn fyri Suðuroynna og Sandoynna? Hava vit nakað val? Eftir fólkatalsgongdini at døma, so hava vit ikki tað.

**Sosialurin**

Góði Kuupik

## Viðmerking til Kuupik Kleist, fólkatingsmann

**HELGI ABRAHAMSEN**



Grønlendski fólkatingsmaðurin Kuupik Kleist hevði eina grein í Dimmalætting tann 1. november, sum var ein viðmerking til tað, sum eg skrivaði í bløðunum tann 26. september um ætlaðu undirvísingina í grønlendskum og íslendskum í føroyska fólkaskúlanum.

Eg skal tí royna at greiða frá, hvør orsøkin var til, at eg í tveimum blaðgreinum í august og september gjørdi viðmerkingar til nevnda málið.

### Skúli til hvat?

Tann sum hevur fylgt við í tí, sum er sagt og skrivað í fjølmiðlunum, tvey tey seinastu árini um fólkaskúlan, sær skjótt, at føroyingar hava havt ilt við at tikið støðu til, hvat skúlin skal brúkast til.

### Globalisering

Á heysti í 2004 varð sagt, at føroysk skúlabørn dugdu alt ov illa enskt, og at hetta kom av, at skúlin legði ov nógva orku í at læra tey danskt. Boðskapurin tá var tí "inn við enskum og út við donskum". Føroyingar skuldu "globaliserast", og í stóru verð tosaðu fólk ikki danskt men enskt. Úrslitið av tí kjakinum gjørdist, at byrjanin til ensktundirvísingin varð flutt úr 5. niður í 4. flokk.

### Pisa

So gongur hálvtannað ár, og so kemur PISA undankanningin. Og aftur er alt á gosi, tí kanningarúrslitið vísti, at tíðin í skúlanum mátti brúkast meira effektivt. Alt óneyðugt mátti tí lúkast burturúr tímatalvuni, og tað í stundini.

### Peningamangul

Aftur gongur eitt hálvt ár, so hoyra vit skúlastjórar greiða frá í fjølmiðlunum, at skúlin hevur ikki nóg mikið av peningi til at seinførir næmingar kunnu fáa sín lógarkravda rætt til stuðul.

### Útnorðurráðið

Tá er tað at Kuupik Kleist, umboðandi Útnorðurráðið, trínur inn á pallin og sigur, at føroysk børn skulu læra bæði íslendskt og grønlendskt í fólkaskúlanum.

### Skúlabøkur og skúlabyrjan

Síðani er tað hent, at formaðurin í Skúlabókanevndini hevur sagt í blaðgrein, at útlendskar lærubøkur vinna sær innivist longri og longri niður í skúlaskipanina, tí játtanin til skúlabókagerð er ov lítil, og røddir eru eisini farnar at tosa um, at børnini skulu fyrri í skúla. Vit hava snøgt sagt ikki tíð at bíða til tey fylla 7 ár.

### Stór fløkja

Samanlagt er hetta alt ein stór fløkja. Danskt skal út, tí tað er eitt ov lítið mál til altjóðagerðina, men samstundis verður hurðin gloppað fyri íslendskum og grønlendskum, sum eru uppaftur minni mál. Vit hava ikki ráð til at taka okkum av teimum seinføru næmingunum, og skúlabøkurnar fylgja ikki tíðini, men vit skulu hava nýtt undirvísingartilfar til grønlendskt og íslendskt. Tað hava vit ráð til. Eisini verður neyðugt at seta lærarar á skúlabonk, áðrenn teir kunnu undirvísa í íslendskum og grønlendskum, og tað kostar eisini pengar. Skúlatíðin skal brúkast meira effektivt, fyri at skúlin kann klatra upp eftir PISA-stiganum, men kortini sigur Kuupik Kleist nú, at einki annað fak skal víkja fyri grønlendskum og íslendskum. Tað vil siga, at samstundis sum verandi fak skulu effektiviserast, skulu tvey nýggj mál, tvær nýggjar mentanir og søgan hjá tveimum londum, gerast partur av somu undirvísingartímum. Og so skulu børnini fyrri í skúla, fyri at klára at svølgja allan hendan øðiliga gloypibitan av vísdómi.

Samanber hetta við kjakið í fjølmiðlunum, tá nakrir tímar í enskum skuldu inn um skúlans gátt. Tá vóru nógv samd um, at so mátti tilsvarandi tímatal í donskum út ígjøgnum sama hurðagap, tí pláss var ikki fyri bæði enskum og donskum. Nú er pláss fyri øllum.

### Kleist trekkir í land

Tað sær út til at Kuupik Kleist er farin at trekkja í land, hvat undirvísingartilfari viðvíkur. Hann skrivar nú, at útveganin av undirvísingartilfari til nýggju fakini, fer ikki at ganga útyvir møguleikan at endurnýggja verandi skúlabøkur. "Vi opfordrer tværtimod den islandske, grønlandske og færøske regering til at UNDERSØGE, hvilke muligheder der er for sammen – og med støtte fra Nordisk Råd – at finansiere udgivelsen af fælles undirvisningmateriale." (mín undirstriking) Hetta ljóðar sum eitt ógvuliga hóvligt uppskot. Men í tilráðingini frá útnorðurráðnum stendur einki um at landsstýri og stjórn verða biðin um at kanna møguleikar at fíggja undirvísingartilfar við stuðli frá Norðurlandaráðnum. Har stendur stutt og greitt: "Landene opfordres til at lave fælles undervisningsmateriale på alle tre sprog for at tjene formålet". – Og eg endurtaki: Tað kostar pengar!

### Hvørja región?

Kuupik Kleist sigur í greinini tann 1. november, at vit skulu gerast sjálvstøðug, fyri at samstarva uppaftur meira við teimum, "vi deler interresser med på regionalt og internationalt niveau". Hetta ljóðar gott. Spurningurin er bara, hvørja región vit skulu velja? Vit eru jú bæði norðbúgvar, útnorðurbúgvar, evropearar, danskir ríkisborgarar og føroyingar. Hví skulu vit so av øllum velja ta veikastu eindina ?

### Oyðileggi ikki skúlan

Sum eg fyrr havi sagt, so havi eg als einki ímóti at føroysk børn læra um norðurlendska mentan og søgu, men vit mugu ansa eftir, at vit ikki oyðileggja skúlan. Vit kunnu ikki troka tey týdningarmestu fakini út, fyri at geva pláss fyri fakum, ið vit ikki fáa somu nyttu av. Og tað er avmarkað, hvussu nógv fak rúmast á eini tímatalvu.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.